


# Lorentze var ættað frá Gorm tí gamla

**Vit hava roynt at lýsa søguna hjá Símin uttan Garða og hansara børnum gjøgnum teir gravsteinir, sum ættin eigur í gamla kirkjugarði. Hesa ferð hava vit ein part við steininum hjá vermammu Charlottu Simonsen, dóttir Símun**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Á hesum steini eru tvey nøvn Lorentze Hansen f. Vang, og Elsa Augusta Hammer úr Froðba.

Um Lorentze kann sigast, at hon er ættað úr Kaldbak, dóttir Ole Vang f. 1790. Her er í hvussu ein rættulig ættartalva, tí hon gongur aftur til Gorm hin Gamla, d. 940, fyrsta kongin í donsku kongarekkjuni. Hann var sagdur at vera ein fanatiskur heidningur. Aðrir kongaligir forfedrar hjá Lorentzu eru Harald Blåtand, Svend Tveskæg og Knud den Hellige. Ættin kemur til Føroyar við Oluf Hans Wang, sum var prestur í Kvívík 1727-62.

Ein beiggi Lorentzu kallaðist Augustinus Ole Vangsen f. 1822. Hann var bóndi í Frammistovu í Kaldbak og festi í 1851.

Ein dóttir hansara Cathrina Bergitta f. 1872 giftist til Froðbiar við Simon Olavus Hammer f. 1868. Tey áttu hesa Elsu Augustu, sum eisisini er á gravsteininum. Tað einasta, vit vita um hana, er, at hon deyð av tuberklum á sanatoriinum, bert 17 ára gomul. Tað hevur helst verið ov stríggið tá í tíðini at fáa líkið til Froðbiar, tí er hon grivin hjá ommusystrini.

Ein beiggi Cathrinu Bergittu var Óli Vang, pápi Aage Vesturskarð, Niels, Knút, Einar og Evald Vang.



*C. F. Hansen var kendur frá skrivstovuni hjá Müller*

Tá kennast tey flestu við ættina.

Lorentza var gift við Christian Frederik Hansen (1819-1865), sum var jekari. Hann er so ikki komin við á gravsteinin, hvør orsøkin kann vera. Hann er deyður, áðrenn byrjað varð at skriva jarðarferðarprotokol. Tí ber heldur ikki til at síggja, um hann er jarðaður í kirkjugarðinum.

Tey bæði hava so átt tvey børn. Fyrst eina dóttir Christianna Bergitta f. 1851. Hvat ið er hent við henni vita vit ikki.

**Sonurin gekk burtur**

Men ein sonur var Óli Vang Hansen f. 1851, sum í 1880 giftist við Charlottu Simonsen, dóttir Símun uttan Garða. Vanliga var hon kallað Lotta.

Tey búðu við Tinghúsvegin. Lotta misti mannin í bestu árum. Óla Vang, sum hann vanliga varð nevndur, var útrógvin 30. januar 1888. Tað var av besta veðri hendan dagin, og bróðurdóttir Lottu, Jóhanna á Høgabóli, visti at siga frá Pól Nikláa við Ryggjagarð í Nólsoy, at nólsoyingar eisini vóru á útróðri hendan dagin. Teir fóru at landi, tá ið teir høvdu drigið línuna, men Óla Vang setti aftur.

Um kvøldið brast hann á við stormi og kavaroki, og tað spurdist einki aftur frá Óla Vang og teimum, sum hendan dagin vóru við honum.

Hinir menninir vóru: Poul Jacobsen, eystringurin kallður, 63 ár, Elias Jacobsen, bróðursonur eystringin, 26 ár, Mikkjal Pauli Poulsen í Borgarastovu, Magnus Samuelsen í Horni, Dánjal Jacobsen úr Køk í Kopargøtu, pápabeiggi Mikk í Dávastovu og Johannes Claudius Johannesen av Argjaboða.



*Símun hjá Lottu var kendur útróðrarmaður*



*HER HVILER*
*LORENTZE FREDERIKKE HANSEN FØDT VANG*
*F. 5. AUGUST 1818*
*D. 27. DECEMBER 1903*
*AF THORSHAVN*

*ELSE AUGUSTA HAMMER*
*F. 9. AUGUST 1898*
*25. MARTS 1916*
*AF FRODEBØ*

*HERRENS BARMHJÆRTIGHED VARER FRA SLÆGT TIL SLÆGT*
*OVER DE, SOM FRYGTER HAM.*
*LUC. 1, 50*

Áttandi maður á báti var Poul Hansen, Pól í Horni, men honum barst frá.

Hann var so hegnigur og hevði ávíst snildi at fáast við maskinur. Østrøm, sum átti fabrikkina á Skálatrøð, sendi boð etir honum, tí ólag var á eini maskinu. Hann fór tí ikki til útróðrar, og hetta bjargaði honum lívinum.

Ein partur av søguni hjá Símin er, at ein sonur Magnus í Horni var Sámal Samuelsen. Hann giftist við Kristionnu hjá Johan í Hoyvík, son Símun, eftir at hon á ungum árum hevði verið í Danmark og lært til harraskræddara.

Sámal fór út at sigla, og undir fyrra heimsbardaga búsetir hann seg í New Jersey í USA. Kristianna er eftir heima og seymar fyri fólk. Umframt hennara egnu trý børn tekur hon bróðurdóttir Sámal, Elsu, sum hevur mist mammuna, til fosturs. Hon og mamman verða umrøddar í einum seinni parti av hesi røð.

Sámal vildi hava alla familjuna til Amerika eftir at kríggið er liðugt, og Kristianna fór við børnunum. Hon var tríggjar ferðir aftur í Føroyum, men



*Lorentza doyði bert 20 ára gomul*



*Lotta og Óla Vang Hansen*

Sámal var bert eina ferð. Tey fingu eina dóttir afturat, Johanna, eftir at Kristianna var komin til Amerika. Ættarfólk hjá henni vóru við á ættarstevnuni 1. august.

**Útvegaði helvtina av mynstrunum hjá H.M. Debes**

Tað var ikki gamansleikur at sita so illa eftir, men Lotta fell ikki í fátt. Hon setti vevin upp og fór at veva fyri fólk. Soleiðis kundi hon halda húsinum uppi.

Helvtin av bindingarmynstrunum, sum H.M. Debes gav út í síni bindibók í 1932, hevði hann fingið frá Lottu, og á tann hátt eru tey varðveitt.

Lotta átti trý børn. Lorenza doyði av tuberklum í 1907 bert 20 ára gomul. Hon hevði gingið eitt ár á læraraskúla, tá ið hon fall frá. Synirnir vóru Símun hjá Lottu, sum var av bestu útróðrarmonnum í Havn og tiltikin miðamaður, og Christian Frederik, kallaður C.F. Teir slitu høgan aldur.

C.F. Hansen kom 17 ára gamal at arbeiða hjá Søren Müller. Tá ið hann fylti 65 ár skrivaði Dimmalætting:

C.F. Hansen hvis mest særprægede Karakteregenskaber er Troskab og Retlinethed har i mere end 40 Aar været ansat paa Müllers Kontor i Thorshavn. Det er ikke faa, der i Aarenes Løb har haft forbindelse med C.F. Hansen, som har et særdeles indgaaende Kendskab til Skibsekspedition.

At hans ubestridelige Dygtighed nyder almindelig Anerkendelse vidner bl.a. den Kendsgerning, at C.F. Hansen i mange Aar har været Medlem af og Næstformand for A/S Thorshavns Mælkeforsyning og Margarinefabrik. Ligeledes har offentlige Myndigheder nydt godt af C.F. Hansens alsidige Evner, idet han ved adskillige Lejligheder har optraadt som Mæglingsmand i Arbejdskonflikter.

C.F. Hansen har talrige Venner, ja man kan roligt sige, kun Venner.

Ein sonur C.F. Hansen var Ole Vang Hansen (1924-1997), sum var ein kendur danskur málari og grafikari. Sagt verður um hann í Danmark, at "hele livet hentede han inspiration i den færøske natur og sagnverden, og dens drama tolkede han i kompositioner, der trods grafikkens lille format var stort anlagte. Ved hjælp af en lille billedopbygning med brug af få elementer, ofte klipper, hav og himmel, gengav han motivers monumentalitet, understreget af stærke kontraster mellem lys og mørke."

Charlotta doyði í 1943, og hon sat tískil einkja í ikki færri enn 55 ár.

**Keldur:**
Niels J. Arge,
Viggo Christiansen,
Petur Oluf Skorá

**Komandi partur** verður um tann kenda fotografin Else Petersen